kg, og so seint sum í 1949 var prísurin ikki komin longur upp enn 40 oyru.

Tann 90 ára gamla Brynhild Absalonsen av Viðareiði minnist væl, tá ið pápi plagdi at koma norður til Viðareiðis við tvøsti, og hon minnist, hvussu fólkið í bygdini gleddi seg til, at hann kom. Hon minnist eisini, at tvøstið kostaði 4 oyru kg. Tá í tíðini var tímalønin um 50 oyru, so tað fekst nógvur matur fyri eina tímaløn. Tað kann eisini verða skoytt uppí, at Brynhild minnist væl, at høsnargarðurin hjá pápa varð umrødd millum manna. Tað sum Brynhild minnist best var, tá ið tey fingu at vita at høsnarungarnir komu úr eini maskinu! At hetta bar til var púra nýtt.

Tá ið eg fór úr skúlanum, fór eg ikki til skips beinanvegin, tí eg fór at sigla fast við pápa við hesum tvøstflutninginum.

## Fór við Norðbúgvanum

Tá ið eg var 18 ár, fór eg í 1939 við Norðbúgvanum, har Esmar mammubeiggi var skipari. Hetta var trolari, sum beint frammanundan var keyptur av Christian Holm Jacobsen til Føroya fyri kr. 110.000, sum hevur verið nokk so nógvur peningur tá ið tíðini. Norðbúgvin varð roknaður sum ein framkomin trolari eftir tátíðar viðurskiftum. Hann var nýggjastur av teimum seks trolarunum, sum vóru eftir í 1942, tá ið hinir fýra vóru søktir av krígsávum. Hann var eitt stak væl hildið skip, men tó kanska nakað mjáur.

Vit fiskaðu við Noreg, og vóru á veg hagar í apríl 1940. Tá vit vóru komnir inn móti Lofoten, hoyra vit í útvarpinum 9. apríl, at Noreg var tikið av týskarum. Vit løgdu róðrið í borðið, fara heim og síðan fara vit til Íslands.

Eg var 33 túrar út í eitt við Norðbúgvanum. Vanliga plagdu menn at skiftast at vera við, men tað bar ikki til at skifta allar í senn. Tað var mangul uppá trolmenn, og eg varð mettur at vera ein slíkur, og mátti vera meira fast við. Hans Pauli Johannesen gjørdist skipari í 1942, og Esmar fór við trolaranum Leiv Øssurson hjá Arbejdernes Trawlerdrift á Tvøroyri.

Fólkið varð næstan altíð sett av í Føroyum, tá ið farið var til markna. Tað vóru bert nakrir fáir mans, sum fóru niður við, og eg var næstan altíð ein av teimum. Eg havi hugsað seinni, at eg var stakur tá, og teir hava ikki vilja havt familjumenn niður við vegna tann vandan sum var. Annars



*Jakku t.v. saman við Hans Bærentsen, seinni bóndi á Sundi. Her eru teir á háskúla í 1941*

var fólkið nógv skift, eisini fyri at kunna hjálpa flest møguligum at fáa eina inntøku. Tað kundu vera upp til 100-150 mans við í einum ári, hóast manningin í senn bert var góðar 20 mans.

Tá ið vit komu á Havnina, máttu vit altíð á Skansan at fáa siglingarordrar, og fingu vit tá at vita, hvar vit kundu sigla fyri at vera fríir av minum, sum bretar høvdu lagt sum verja móti týskum herskipum.

Vit fiskaðu bara ein túr undir Føroyum, annars fiskaðu vit altíð undir Íslandi.

Norðbúgvin var fyrsta útlendska skip, sum landaði fisk í bretskari havn undir krígnum, og hetta var byrjanin til ein serligan part í okkara siglingarsøgu, har føroyingar stóðu fyri stórum parti av tørvinum fyri fiski hjá bretum.

Eg var ongantíð í nakrari beinleiðis vandastøðu. Men eina ferð sigur Esmar, at nú hevði eg verið so nógvar túrar niðri við, hesa ferð skuldi eg sleppa sleppa undan. Tá varð Norðbúgvin álopin av týskum flogførum saman við Stella Argus, sum var á somu leið. Tá mundu teir farið. Norðbúgvin var so gjøgnumgataður av kúlum, tá ið hann kom aftur.

Vit plagdu at vera 21 mans til fiskarí, og tað fóru kanska 7-8 niður við. Fyrru árini plagdu vit at fara til Fletwood, vestantil í Skotlandi, men tey seinnu árini var tað mest Aberdeen.

## Teir síðstu sum sóu manningina á Tór 2

Vit vóru í Fleetwood samstundis við Tór 2, tá teir landaðu teirra seinasta túr. Eg minnist væl manningina. Vit vóru saman inni á matstovu í Fleetwood og fingu okkum fish and chips. Tað var merkisvert, sum manningin á Tór 2 tyktist at vera friðarlig og álvarsom, og tað var lítið um teir. Gud viti, um teir kendu nakað á sær.

Vit skuldu fylgjast á veg til Íslands. Teir sigldu frammanfyri, og teir høvdu eitt lítið kámt ljós á hekkuni. Men so kom eitt æl, og tá sóu vit teir ikki aftur. Tá vóru vit framvegis fram við bretsku strondini. Vit fóru eins og teir beinleiðis til fiskiskap, og vit frætta einki aftur, fyrr enn vit endaðu túrin og komu inn á Reykjavík at fáa siglingarordrar. Tá fáa vit at vita, at Tór 2 er søktur av einum týskum kavbáti, og 18 av teimum 21 monnunum umborð doyðu.

Her kann verða skoytt uppí, at FF-blaðið hevði í 2004 eina samrøðu við Malmberg Simonsen úr Sørvági, sum var ein av teimum trimum monnunum, sum bjargaðust. Tá sigur Malmberg millum annað:

*Í 1942 fóru vit avstað aftur, vit lógu á Kollafirði. Tá ið kvøldið kom fóru vit heim á Stykkið, Karl svágur og eg. Vit fóru so av Stykkinum aftur og oman til Kollafjarðar og umborð. Men tá sigur Karl: »Malmberg, tú kemur at liva og eg komi at doyggja.« »Tvætl,« sigi eg. Hann hevur havt okkurt ánilsi, tí hann segði hetta við meg aftur seinni á túrinum. Men sum tað sæst við øðrum líknandi frásagnum, kundi hetta ikki steðga honum at fara.*

Tað gekk júst sum Karl hevði sagt, og spurningurin er, um tað er sama kenslan, sum hevur merkt manningina, tá ið vit hittust í Fleetwood.

Vit hava helst verið heilt nær Tór 2, tá ið teir vóru søktir. Niels Juel Arge skrivar í síni bókarøð um bardagaárini, at teir á týska kavbátinum høvdu sæð royk av einum skipi. Kavbáturin var farin at sigla eftir roykinum, men misti hann burtur. Hetta kann væl hava verið Norðbúgvin.

Seinni kom eg at kenna Malmberg Simonsen, sum var ein av teimum trimum monnunum sum yvirlivdu. Hansara søga hevur verið prentað í FF blaðnum. Tað má sigast at vera eitt undur, at hann og hinir báðir vóru bjargaðir. Malmberg var á veg til botns, tá ið hann flotnaði upp aftur, og saman við hinum báðum kom uppí ein bát. Síðan nýttu teir meira enn eitt samdøgur at sigla inn til Vestmannaoyggjarnar. Øll søgan hjá Malmberg til sjós kann síggjast á heimasíðuni: www.fiskimannafelag.fo gamla heimasíðan, bløðini 312 og 313.

Norðbúgvin var kolfýrdur sum flestu trolarar, og av saltfiski tók hann eini 200 tons ella nakað minni. Annars varð fylt mest møguligt í lastina, tá ið siglt var við ísfiski. Hillar, sum tekur vektina av ísfiski í lastini, vóru næstan ikki brúktar undir krígnum. Undir krígnum vóru keypararnir ikki so kræsnir.

Hesir trolarar vóru altíð vátir, og dekkið var ofta undir í sjógv. Sjálvt, tá ið teir fóru avstað, vóru teir fult lastaðir av ísi og koli.

## Kundi verið stór vanlukka

Hesa tíðina fór eg so einaferð á háskúla í Havn. Hetta var í 1941. Men tá lá Norðbúgvin. Tað var ein tíð undir krígnum, tá ið skipini ikki vildu sigla, tí tað var so vandafult. Á háskúlanum var eg tveir mánaðir. Tá sendu teir boð eftir mær aftur fyrst í desember.

Hesa tíðina, eg lá heima, var eg eina ferð sunnan av Borðuni við Mot saman við pápa við kalvalínu. Tá kom eitt troppaskip inn móti Havnini. Tað vóru 700 hermenn umborð. Nú kemur ein flúgvari inn av havinum, eg sá, at hann kom so tætt niður eftir sjónum. Vit vóru tveir fjórðingar suður úr Borðuni, og troppaskipið var ein fjórðing sunnanfyri okkum. Flúgvarin fór móti troppaskipinm og lyfti seg upp, so lágt fleyg hann, og so kastaði hann bumbur, men tær brustu ikki. Tað ljóðaði, at bumburnar høvdu verið saboteraðar. Har hevði verið ringt skil eisini hjá okkum við so nógvum fólki, um tað gekk eftir ætlan hjá týska flogfarinum. Tað hevði verið ringt at bjarga eisini, tí báturin var bert fimm tons stórur.

## Vóru við til at sleipa Carolina Thordén

Ein av teimum nógv umrøddu hendingunum undir krígnum var týska bumbingin av finska farmaskipinum Caroline Thordén í 1941. Skipið var á ferð úr Finlandi til USA og var komið inn á Havnina á leiðini. Finland var uttanveltað land, so hetta skuldi ikki verið nakar vandi.

Umborð vóru 35 ferðafólk. Við manningini vóru 78 fólk við. Men á veg avstað aftur verður skipið bumbað í fleiri umførum av týskum flogførum, og eldur kemur í tað. Eldurin var so stórur, at tað var ljóst í Nólsoy á nátt. Fólkið umborð varð bjargað í land. Roynt varð at sløkkja eldin, men tað munaði lítið.

Skipið lá eina heila viku í Nólsoyarfirði og brendi framvegis, og nú var skipað fyri at fáa tað burtur. Avgjørt varð at fáa tað sleipað norð til Hvalvíkar. Tískil varð avtala gjørd við reiðaríini á Stellu Argus og Norðbúgvan um at sleipa Carolinu Thordén norður hagar og at seta skipið fram á sandin. Hetta dámdi hvalvíkingum einki, men tí varð ikki lurtað eftir.

Við Esmari Fuglø umborð



*Tvøst verður vigað í Lopra. Her fekst altíð góð vekt*